## DAGSINS MEINING

# Spara har tørvurin er størstur

Tað mundi koma óvart á nógv at hoyra, at rætturin til heimahjálp, ið hevur verið ein sjálvfylgja í nógv ár, nú knappliga ikki er so sjálvsagdur, sum hann hevur verið. Áhugavert verður at hoyra frá samgonguni, hvussu hetta sampakkar við lyftini um, at blokkniðurskurðurin uppá 366 milliónir um árið, ikki fór at fáa nakra ávirkan.

Hetta sigur nakað um, hvussu sitandi samgonga raðfestir. Ábyrgdarleysi risastóri – við einum høggi - blokkniðurskurðurin skal ganga útyvir tey gomlu, meðan umsitingin setir met í útreiðslum.

Tað er upplýsandi fyri borgaran, og harafturat alla æru vert, at starvsfólkini í Heimarøktini siga, sum er. Tað er nú einaferð soleiðis við pengum, at virðið av teimum kann ikki lata seg diktera av kenslubornum loysingarretorikki. Tað er at vóna, at samgongan nú tekur seg um reiggj, og fær peningin til vega, ið heimarøktini tørvar, við at endurraðfesta almennar útreiðslur. Hetta kundi til dømis verið gjørt við spardari umsiting, tí eitt er vist, og tað er, at eftir blokkniðurskurðin, er ikki ráð til at økja um samlaðu almennu rakstrarútreiðslurnar.

Tað er nú tíð uppá, at samgongan etur orðini í seg aftur um, at blokkniðurskurðurin ikki fór at fáa nakra ávirkan. Hetta síggja vit í dag, har vunnin vælferðarrættindi verða strikað, og eykaavgjøld verða løgd á brúkaran fyri so dánt at fáa endarnar at røkka saman.

Teir politikarar, ið samtyktu alt ov stóra blokkniðurskurðin, fara neyvan í søguna sum teir mest framskygdu politikararnir, vit hava havt. Fólkaflokkurin, Tjóðveldisflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin hava tikið alt ov rívan til í blokkniðurskurðinum. Tjóðveldistingmenn og fólkatingsmaðurin høvdu viljað sloppið at skorið meir í blokkinum, meðan fólkafloksmenn helst eru eitt sindur kløkkir av stóru ávirkanini av blokkniðurskurðinum. Hvat núverandi leiðsla í Sjálvstýrisflokkinum heldur um blokkniðurskurðin er ilt at siga, men undanfarna leiðsla við Helenu Dam á Neystabø á odda gekk heilhjartað inn fyri niðurskurðinum. Óivað var hetta medvirkandi til, at fyrrverandi formaður Sjálvstýrisfloksins ikki slapp at stilla upp fyri Javnaðarflokkin, ið saman við Sambandsflokkinum staðiliga ávaraði ímóti ógvusliga blokkniðuskurðinum.

Tað, ið kann undra mest, er, hví búskaparfrøðingarnir hjá landinum ikki ávaraðu ímóti avleiðingunum av ógvusliga blokkniðurskurðinum. Heimarøktin og sodavatnsavgjald er bara byrjanin, og nú mugu allar góðar kreftir í Tinginum og aðrastaðni stríðast fyri at avmarka skaðan, soleiðis at grundleggjandi vælferðartænasturnar ikki verða skerdar, hóast útreiðslustøðið hjá tí almenna má skerjast munandi, sum ein beinleiðis avleiðing av blokkniðurskurðinum. So kann samgongan tosa um "kunstiga vælferð". Vælferð er ikki kunstig, hjá teimum, ið tørva hana. Tað verður ikki talan um, at vit her í Føroyum skulu raðfesta soleiðis, at gomul, sjúk og skúlaungdómur skulu svíða fyri ábyrgdarleysar samgongupolitikarar. Hava tað verið boð eftir andstøðuni fyrr, so eru hesi boð meira neyðug nú enn nakrantíð.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Positiv gongd á Landssjúkrahúsinum

**Poul Geert Hansen**
*Sjúkrahússtjóri*



Á einum so stórum arbeiðsplássi sum Landssjúkrahúsinum, við yvir 600 ársverkum og 800 høvdum, slepst ikki undan, at tað til tíðir eru tvídráttir og ymsar meiningar um, hvussu tingini skulu hanga saman. Tað skal tað eisini verða, tí annars er vandi fyri, at alt stendur í stað og so er eingin framburður.

Ósemjur á Landssjúkrahúsinum finna tíverri ov ofta veg til yvirskriftirnar í fjølmiðlunum, hóast tær áttu at verið loystar innanhýsis. Síðst hevur tað verið tvídrátturin millum yvirlæknarnar á skurðdeplinum og sjúkrahúsleiðsluna. Málið hevur snúð seg um, at yvirlæknarnir hava verið misnøgdir við, hvussu leiðslan hevur útint sínar uppgávur og hava teir mælt til eina endurskoðan av leiðslubygnaðinum.

Landsstýrismaðurin kom inn í málið og hevur gjørt sína niðurstøðu. Hon er at leiðslubygnaðurin ikki verður broyttur í løtuni. Men sjónarmiðini hjá yvirlæknunum vilja innganga í eina støðuga eftirmeting av leiðslubygnaðinum á sjúkrahúsinum. Landsstýrismaðurin hevur haft eitt gott samstarv við sjúkrahúsleiðsluna og í mun til yvirlæknarnar, verður mælt til ein betri dialog og at hugt verður frameftir.

Fjølmiðlarnir hava serliga valt at endurgeva úr tilfari, sum yvirlæknarnir førdu framm á eini munnligari hoyring í Familju- og Heilsumálaráðnum tann 6. mai í ár. Skrivligu viðmerkingarnar, sum leiðslan kom við aftaná, vísti á fleiri misskiljingar og faktuellar feilir, men hetta hevur ikki haft sama áhuga, hóast fjølmiðlarnir eisini hava fingið innlit í hetta tilfarið.

Sosialurin hevur brúkt skjalatilfar, sum ikki er fingið gjøgnum umbøn um alment innlit. Blaðið hevur tíverri ikki kent sínar etisku greinsir fyri, hvussu slíkt tilfar átti at verið handfarið.

Í tvídráttinum millum yvirlæknarnar á skurðdeplinum og sjúkrahúsleiðsluna, hevur kanska verið tikið nakað harðliga til orðanna onkuntíð. Men sum heild hevur ósemjan verið handterað á einum rættuliga sømuligum støði. Í eina tíð hevur verið bíðað eftir niðurstøðuni hjá landsstýrismanninum, men sjúkrahúsleiðsla og yvirlæknarnir á skurðdeplinum eru komin víðari og eru samd í at hyggja frameftir og rætta upp á feilirnir í samskiftinum.

Landssjúkrahúsið hevur nógvar spennandi avbjóðingar fyri framman. Um eitt hálvt ár skal nýggjur sjúkrahúsbygningur takast í nýtslu og hesin gevur sera góðar møguleikar fyri at endurskoða og betra um sjúklingagongdirnar á sjúkrahúsinum. Hetta er nakað sum kann viðføra stórar batar fyri bæði sjúklingar og starvsfólk.

Tað er sera týdningarmikið, at menningargongdin sum nú er sett í verk, hevur eina breiða undirtøku á sjúkrahúsinum og at tey, sum hava tað neyva innlitið í tey ymsu økini, eru virkin og við í hesum arbeiðinum. Tað eru nógvir partar, sum skulu samskipast og spæla væl saman, fyri at úrslitið skal blíva gott.

# Ikki ein spurningur um heimspeki, Sjúrður

**Lasse Klein**



**Men hetta snýr seg um veruligar hendingar, og lítil ivi er um, at 75% av øllum føroyskum veljarum eru samdir við mær í mínari niðurstøðu í greinini "Ein samgonga á vegamóti". At fáa íblástur frá øðrum tá tað tænir einari góðari søk, er gagnligt**

Tað er púra rætt, og tað er heldur einki yvir at dylja, at undirritaði fekk íblástur til grein sína: "Ein samgonga á vegamóti" og tað dugi eg ikki at síggja er nakað forgjørt í tí.

Dagliga fáa vit menniskju íblástur, so óneyðugt er at taka heimspekina til hjálpar, tá tað snýr seg um politisku viðurskiftini her á landi.

### Íblástur hinumegin borði

Tað er ikki so trupult at meta um hvar Sjúrður Skaale fær sín íblástur frá, og valla fekk hann íblástur frá heimspekini tá hann skrivaði greinina: "Lasse Klein: Ein filosofiskur tungvektari". Helst hevur hann fingið íblásturin hinumegin borði.

Tað er heldur einki forgjørt í tí at hava sínar fyrimyndir, men svikaligt kann tað verða við hvørt at røkja politiskar fyrimyndir og fáa íblástur frá teimum. Tá hevði tað verði frægari at heimspekin var tikin til hjálpar.

### Frálíkar eginleikar

Eri í veruleikanum eitt sindur harmur um Sjúrður Skaale. Hann hevur nakrar frálíkar eginleikar, hann dugir at tosa, hann dugir at skriva, hann dugir at undirhalda, ja hann dugir mangt og hvat, men so spurdi eg meg sjálvan hví ein tílíkur maður sum hann ikki kundi halda seg til veruleikan.

Hann hevur uppliva allar hesar stríðsfúsu samgongumennirnar í Tjóðveldisflokkinum og Fólkaflokkinum, allar tær meiningsleysu og illavorðnu ósemjurnar hevur hann verði partur av. Hann hevur eisini hoyrt øll rópini. Hevur sæð dálkaða grundvøllin.

### Vón mín

Og tí vónaði undirritaði at niðurstøða hansara var, at hann var noyddur til at geva greinskrivaranum til greinina "Ein samgonga á vegamóti" rætt, men tað gav hann ikki til kennar í hesum umfarinum.

Men tað skal ikki dyljast, og at tað er vón mín, at Sjúrður Skaale kortini hevur fingið íblástur, soleiðis, at hann eisini kann virða meiningarnar hjá øðrum.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.


## VIÐMERKINGAR

# Kommunurnar gíslar hjá landinum

**Finnleif Guttesen**
*býráðslimur á Tvøroyri*



Verandi samgonga sigur, at yvirtaka kommunurnar ikki barnaverndar- og eldraøki sjálvboðin, so noyða vit tykkum til tað.

### Orsøkin

Til at leggja út til kommunurnar skal vera hugtaki nærleiki? Høvdu vit nú búð í USA, Kina ella øðrum størri landi kundi ein skilt hetta, men í Føroyum er grundgevingin ørvitistos og undanførslur.

Tí veruliga orsøkin er ein fíggjarligur spurningur og einki annað, tí landið hevur turka útreiðslur av uppá kommunurnar og ætlar at blíva við, til fíggjarlógin hjá landinum hongur saman..

### 27,4 prosent í kommunuskatti

Barnaverndarøki kostar umleið 55 mill krónur um ári og er ætlanin, at kommunurnar kunnu hækka skattaprosenti 0,9 meðan landið lækkar sítt tilsvarandi.

Eldraøki skal brúka 114 mill krónur í nýbyggingum og árliga 112 mill krónur í øktum rakstrarútreiðslum, bert fyri at nøkta bráfengis tørvin á eldraøkinum.

Eftir útrokningargrundarlagnum á barnaverndarøkinum gevur hetta eina øking av kommunuskattaprosentinum uppá 4 prosent.

Fyri Tvøroyri hevði skattaprosenti hækka frá 22,5 til 27,4 prosent og sjálvt um landsskatturin lækkar tilsvarandi verða tað tey lágløntu, sum blíva rakt, tí tey merkja kommunuskattaprosenti mest.

### Løgmaður og Almannaráðharrin

Bæði løgmaður, sjálvt um tað er ivasamt hvat ein kann leggja í hvat hann sigur og embætisfólk hava sagt , at tað kemur at taka 5-10 ár áðrenn tað fíggjarliga býti er klárt millum land og kommunur. Men Almannaráðharrin, fyrrverandi kommunupolitikari sigur, at barnaverndarøki skal yvirtakast 1.januar 2004 og eldraøki 1.januar 2005.

Ein má undrast yvir, hvat hesin ráðharrin hevur ímóti kommununum og hví, tí ongar sakligar grundgevingar eru fyri at skunda hesi mál ígjøgnum, uttan sjálvsagt tær fíggjarligu fyrimunirnir hjá landinum.

### Undirtøkan frá kommununum

Sum gísli er tú ofta noyddur at gera sum gíðslatakarin (landið) sigur, men tað er ørskapur frá fólkavaldum kommunupolitikarum, eisini teimum sum sita á tingi, at taka undir við hesari framferð hjá almannaráharranum, tí hvat liggur veruliga aftanfyri hesum, at skunda hesi týdningarmiklu og fíggjarligu stóru mál ígjøgnum so at landið sleppur undan útreiðslum og íløgum??????

### Land og kommunur

Tað hevur ikki gingið betri ella verri hjá kommunum enn hjá landinum, tí skuldi tað ikki verið nøkur orsøk til at landi turkar sínar fíggjarligu byrðar av uppá kommunurnar.

Nakrar kommunur hava hækka, aðrar hava lækka sítt skattaprosent alt eftir tí fíggjarligu støðu kommunan er í og tá ið landi hevur lækka sítt skattaprosent, so má tað sjálvsagt verða tí landið hevur ráð til tað, ella?

# Samgongan skal ansa sær - her verður spælt høgt spæl

**Jógvan við Keldu**
*løgtingsmaður*



Skymast verður nú í ymsar ættir fyri at vita, hvar fleiri byrðar kunnu leggjast á. – Toll,- skatta,- og avgjaldstrýstið kann ikki hækka.

Hvørja ferð fíggjarlóg verður løgd, eru ynskini fleiri enn tøkur peningur er til. Betri tíðirnar eru, harðari gerast krøvini frá fólki innan- ella uttansindis politiska heimin.

At skatta- og avgjaldstrýstið á borgaran er vorið nóg tyngjandi, ivast eingin í.

Umframt, at ikki ber til at hækka skatta- og avgjaldstrýstið, skal gerast vart við, tá nú játtanir bert skulu flytast millum eindir og stovnar, at ikki er líka mikið, hvar hesar upphæddir verða fluttar.

### Fleiri fíggjarligar byrðar

Í samband við fíggjarlógina fyri 2004, hevur talan verið um at leggja fleiri fíggjarligar byrðar frá landskassanum á kommunurnar.

At eitt nú hækka játtanir til Landssjúkrahúsið meðan Klaksvíkar Sjúkrahús verður nullstillað og játtanin til Suðuroyar Sjúkrahús verður lækkað, tí roknað verður við - eins og farin ár - at landsstýrismaðurin setur lítla játtan á til smærru sjúkrahúsini, so kann Fíggjarnevndin taka sær av hesum, og Landssjúkrahúsið eisini fær nakað meiri í somu útbering. Hetta er bílig, primitiv og óverdug loysn, og fer ikki at bera uppi.

Samstundis – fyri at fáa meiri pening í avgjaldi – ætlast fleiri inntøkur fáast við at hækkað toll- og avgjøld á góðgæti, sodavatn og plastikkposar.

Eisini havi eg skilt, at samgongurflokkur okkara Tjóðveldisflokkurin einki hevur ímóti at hækka avgjøld, ið leggjast skulu á borgaran.

### Ikki fleiri avgjaldsbyrðar á kommunurnar

Lat meg fyrst siga, at tað er ikki bara ólátað, at lyfta fleiri byrðum av landskassanum fyri at leggja tær á kommunurnar, men hetta er ómoralur. – Hesin hugburður byrjaði, tá Helena á Neystabø sat sum landsstýrismaður í almannamálum, fyri at fáa hennara part av fíggjarlógini at "ganga upp", varð upphædd viðvíkjandi fríplássum innan barnaansingina bert "kalt" flutt til kommunurnar. – Fleiri mótmæltu tá hesum.

### Sjúkrahúsini líka fyri lógini

Seinasta ár, vóru 2,4 mió. krónur skerdar av Klaksvíkar Sjúkrahúsi, sum vóru ætlaðar til ortopediskar skurðviðgerðir. Hetta hevði við sær, at 20 færri skurðviðgerðir vórðu framdar.

Samstundis verða játtaðar fleiri upphæddir til íløgur og í rakstri til Landssjúkrahúsið, sum vit vita ikki hevur havt tað so gott av ósemjum, og hvørja ferð, tá nýggj fíggjar-ætlan skal leggjast, fáa vit sum politikarar at vita, at "um hesin peningur ikki verður játtaður", verður Landssjúkrahúsið fyri hóttafalli.

Lat meg eisini leggja afturat, meðan eg skrivi, at eg eri sera skeptiskur viðvíkjandi hesum nýggja rákinum, at senda sjúklingar í eyst og vest og rokna við, at nógvur peningur á hendan hátt kann sparast.

### Avgjøld til endamáls at minka landskassahallið

At meiri peningur kemur í landskassan – 30 mió. krónur – av at taka avgjøld fyri góðgæti, sodavatn og plastikkposar, vísir heilt greitt, at hesi avgjøld eru ikki fyri at "minka um heilsuvandan" hjá børnum og verja umhvørvið, tí her kemur jú meiri inn í landskassan. Her er talan kanska meiri um at "minka um landskassahall".

Eg havi bert víst á hesi trý málini. Her eru vit á tunnum ísi..

Tjóðveldisflokkurin má gera sær greitt, at ikki ber til at taka meiri pening inn í skatta- toll- og øðrum avgjøldum.

Vit í Fólkaflokkinum mugu gera okkum greitt, skal almenni sektorurin ikki framhald-andi økjast, má setast inn, har flestu pengar verða nýttir.

Samgongan – øll sum hon er – skal nú ansa sær, skal hon koma væl burturúr tíðini hon hevur eftir at virka í.

# Biðin um at skriva grein í FREGNUM

**Lasse Klein**

Men hongdur út av skrivaranum hjá ritstjóranum, og tí havi eg eisini valt at greitt frá mannagongdini, hjá "seriøsu" monnunum aftanfyri blaðið FREGNIR.

Eisini Sjálvstýrisflokkurin skuldi umboðast í greinarøðini "POLITISKA KVØRNIN" í blaðnum FREGNIR.

### Torbjørn ringir

Tað var arbeiðsgevarin hjá Sjúrða Skaale Torbjørn Jacobsen, sum ivaleyst stendur fyri greinarøðini, eitt slag av ritstjóra, sum ringdi undirritaða upp fyri einum 10 døgum síðani, og bað meg um at skriva eina politiska grein til FREGNIR, og orsøkin til at hann bað meg var tann, at hann hevði fingið at vita at undirritaði var formaður fyri Landsfelag Sjálvstýrisfloksins, og bað meg tí av hesi orsøk um at skriva greinina. Eg játtaði, m.a. tí at Torbjørn Jacobsen yngsti breiða politiska umboðan í hesum teiginum sum eitur: "POLITISKA KVØRNIN".

Torbjørn Jacobsen grundgav týðuliga orsøkina: hann hevði biði floksformannin í Sjálvstýrisflokkinum Kára P. Højgaard um at skriva, men orsaka av tíðarkrevjandi arbeiði í tinginum bar tað honum ikki til. Hann hevði eisini hugsa um Eyðun Elltør, landsstýrismann fyri Sjálvstýrisflokkin. Av eini ella aðrari orsøk bleiv hetta av ongum, ella hevði hann ikki fingið samband við hann. Hetta vóru í hvussu er boðini undirritaði fekk.

### Síðani skrivarin

Aftaná hesa góðgerð leggur skrivarin hjá Torbjørn Jacobsen Sjúrður Skaale undirritaða undir at vilja yvirtaka SJÁLVSTÝRISFLOKKIN. Hann skrivar m.a. "Tað er ikki at vera fyri, nú Lasse aftur ætlar at yvirtaka Sjálvstýrisflokkin". "Og hvat vit føroyingar kunnu vænta okkum, nú Lasse Klein aftur ætlar at yvirtaka Sjálvstýrisflokkin".

### Arbeiðshátturin

Fyrst biðja teir um greinina, síðani leggja teir eina ætlan um hvussu teir skulu handfara innihaldið í greinini, og reina á tann hátt at skaða góðtrúna greinskrivaran, og leggja eina ætlan, alt sjálvandi eftir innihaldinum í greinini. Greinin skuldi verða FREGNUM í hendi nærum eina viku aðrenn prenting av blaðnum, hetta tí at baksíðan á blaðnum ivaleyst tørvaði tilfar. Skrivarin fær til uppgávu at loypa út í orð, og at sáa mistreysti niður í ávís fólk.

### Demokratiskur felagsskapur

Hvørki Torbjørn Jacobsen ella Sjúrður Skaale skulu verða í iva um, at Sjálvstýrisflokkurin hevur ein demokratiskan felagsskap, og at tað stendur limum floksins púra frítt at velja síni umboð.

Annars haldi eg at arbeiðshátturin hjá feðgunum: Torbjørn & Skaale, er væl lýstur í grein míni: "EIN SAMGONGA Á VEGAMÓTI".

# Fullveldið

**Svenning Borg**
*Vágur*

Nú okur stýra á fullveldisleið, koma ymiskir boðar fyri á kósini.

Okra kæri landskassi fer ikki nokk av peningi inn og eru tí hyggjuráðini, at skatta alt tað lakressi, sum børnini eta.

Tað kann lættliga blíva til einar tjúgu milliónir í skatti,sum børnini skulu gjalda, fyri at eta lakress.

Hugsi um ,hvussu nógv almenn størv hjá fullveldissamgonguni kunnu setast afturat, fyri lakress skattin hjá okra børnum.

Hvat verður tað næsta, kanska ein skattur fyri at anda føroyska luft niður í seg, tað verður so fullveldisluft, í hesum fullveldistíðum. Leingi livi lakressveldi.

Jú, mangt er undarligt í hesi verð.